## Seldu fleiri bløð

Tað vóru tey, sum spáddu, at fólk fóru at keypa færri bløð, nú tað ber til at fáa tíðindi á heimasíðum á alnótini, men sambært altjóða blaðfelagsskapinum World Association of Newspapers er spádómurin ikki gingin út. Í einari frágreiðing, sum er løgd fram á fundi hjá felagsskapinum, stendur, at blaðsølan vaks 1,3 prosent í fjør. Tað merkir, at hvønn einasta dag í fjør keyptu fólk og fyritøkur 539 milliónir bløð í meðal. Tann størsti vøksturin var í Kina, Japan og India, men harafturímóti minkaði sølan í Evropa og í USA. Frágreiðingin hjá WAN vísir eisini, at bløðini fingu fimm prosent minni í lýsingainntøkum í fjør enn árið fyri.



## Jeltsin fingið bókasavn

Í Russlandi hevur tann politiska leiðslan gjørt av at heiðra landsins fyrsta forseta, Boris Jeltsin sála, við at ogna minni hansara eitt nýtt bókasavn í Sankta Pætursborg. Tað var Dmitrij Medvedev, forseti, sum alment lat bókasavnið upp á gjár. Á savninum eru 40.000 bøkur og lutir, sum lýsa russisku søguna frá zartíðini til dagin í dag. Boris Jeltsin er ikki so avhildin allastaðni í Russlandi, tí nógvir russar halda, at hann setti ov nógva ferð á nýskipaninar, og at tað koyrdi nógv fólk út í fátækradømi. Hinvegin verður hann mettur sum hetja í Ural-økinum, haðani hann var ættaður.

# Nóg mikið av parkeringsplássum

**Sambært kanning, sum ferðslufyritøkan, Rambøll, hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu, er nóg mikið av parkeringsplássum í býnum. Tey verða bara skeivt umsitin. Serliga Skálatrøð og trý onnur parkeringspláss verða nevnd, har tað er nærum ógjørligt at finna pláss og tí skal gjald á tey**



*Sambært kanning, sum Rambøll hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu, er ov fá parkeringspláss sum hesi, har tað er avmarkað, hvussu leingi ein bilur sleppur at standa*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PARKERING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í dag fer Tórshavnar býráð at viðgera støðuna við parkering í býnum, har eitt uppskot millum annað er at seta parkometur upp, so fólk verða noydd at rinda fyri at seta bilin í miðbýnum. Hetta samsvarar við kanning, sum Rambøll hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu.

Eitt av úrslitunum av kanningini er, at langtíðarparkeringsplássini gera tað trupult hjá øðrum at gera síni ørindi í býnum, tí størstu parkeringsplássini hava onga avmarking. Kanningin sigur beinleiðis, at klokkan 14 eru 95 til 100 prosent av plássunum á Skálatrøð, á Frúutrøð, í J. Paturssonargøtu og á Glaðsheyggjum í nýtslu klokkan 14, umframt, at bara eini 13 prosent av plássunum í innara miðbýnum eru tøk um somu tíð.

### Alt upptikið

13 prosent av parkeringsplássunum í innara miðbýnum er ikki nógv, tí tað svarar til, at bara 20 pláss. Tí almennu parkeringsplássini eru 732 í tali í innara miðbýnum.

20 pláss kunnu tykjast at vera ríkiligt at hava, tá tú bara nýtir eitt, men trupulleikin er, at tað tekur so langa tíð at finna eitt parkeringspláss í miðbýnum.

Í kanningini hjá Rambøll stendur, at 15 til 20 prosent av plássunum mugu vera tøk, so mann ikki hevur ov nógvan parkeringsleitandi trafik.

Tað vil við øðrum orðum siga, at tey, ið hava tørv á at gera smá ørindi, ikki hava møguleika at seta bilin í miðbýnum, tí plássini eru upptikin av fólki, sum standa har allan dagin.

### Útum at seta bilin

Tí leggur kanningin hjá Rambøl upp til, at fleiri tíðaravmarkingar verða settar á parkeringsplássini í innara miðbýnum, tí fólk plaga at góðtaka at ganga ein longri tein, um tey skulu seta bilin í longri tíð.

Ein niðurstøða í kanningin er, at kommunan hevur umsitið parkeringina skeivt, tí ein stórur partur av plássunum, ið liggja heilt væl fyri verða nýtt til langtíðarparkering. Skálatrøð er eitt av hesum økjum.

### Rinda fyri parkering

Sum eina møguliga loysn nevnir kanningin krevja gjald fyri parkering í hesum økjum, sum liggja væl fyri. Tí verður gjald kravt fyri parkering, so hevur tað við sær, at fólk parkera í styttri tíð, og heldur seta bilin longri úti í býnum, har tað er ov mikið av plássi, um fólk skulu seta bilin í longri tíð.

Soleiðis slepst eisini undan óneyðugari parkering. Tað vil siga, at fólk, sum ikki hava beinleiðis tørv á at seta bilin so nær miðbýnum, heldur seta hann onkra aðrastaðni.

### Viðgera í kvøld

Í kvøld verður parkeringin í miðbýnum viðgjørd á forfundi í býráðnum. Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, eru sera heit fyri uppskotinum, um at krevja gjald fyri parkering í fleiri støðum í Havn, meðan Jan Christiansen, andstøðulimur heldur minni um uppskotið, hóast hann fer at viðgera tað við opnum sinni.

Í Sosialinum í gjár kom fram, at tað er møguleiki fyri, at gjald verður lagt á longu í 2010. Men at brúkararnir ikki eru so fegnir um hetta.

# Sigarett brendi húsini í Sigmundargøtu

**Sambært kanningunum hjá løgregluni, var tað helst ein sigarett, sum var orsøkin til, at eldur kom í húsini í Sigmundargøtu í Havn**

BRANDUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Brunakanningar eru lidnar, og mann hevur funnið fram til, at tað ikki kann útilokast, at eldurin kyknaði av eini sigarett, sigur Per Skov Christensen, kriminalpolitistur.

Løgreglan upplýsir somuleiðis, at eldur kyknaði í einum kamari á ovastu hæddini, og eldurin byrjaði helst í eini song.

Annars hava fólkini í húsunum greitt frá, at tey luktaðu royk í hesum kamarinum og royndu at sløkkja eldin við vatni. Hetta megnaðu tey ikki, og so festi í restina av húsunum.

- Vit hava funnið fram til, at vitnini høvdu søgdu satt, og nú verður sakin send til fútan, har støða skal takast til, um ein av teimum í húsunum, skal ákærast fyri at hava skuldina av eldinum í ósketni, sigur Per Skov Christensen.

Eldurin er helst ikki settur á við vilja, so í ytsta fall er møguleiki fyri, at ein av íbúgvunum fær bót.



*Sambært løgregluni er stórur møguleiki fyri, at ein sigarett var orsøkin til eldsbrunan við Skipasmiðjuna*